UTTAN ÚR HEIMI

# Nei takk - eg skal doyggja í kvøld


*Fimm doyðu, og umleið 30 fingu skaða í teimum báðum bumbuspreingingunum í Tel Aviv. Her verður ein særdur maður fluttur á sjúkrahús.*

**Annar av teimum báðum arabisku bumbumonnunum, sum sprongdu seg í luftina í Tel Aviv mikukvøldið, fekk tilboð um sex frá einari ísraelskari skøkju. Men hann segði nei takk, tí hann skuldi doyggja. Fimm minuttir seinni sprongdi hann seg í luftina.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Hann var tann fyrri sjálvmorðsbumbumaðurin, sum sprongdi seg í luftina í Tel Aviv mikukvøldið. Løtu seinni gjørdi ein annar tað sama. Umframt bumbumenninar doyðu fimm ísraelsmenn, og umleið 30 fingu skaða.

Seinni greiddi skøkjan Naomi blaðnum Jerusalem Post frá, at hon hevði steðgað øðrum bumbumanninum og boðið honum sex. Maðurin hevði tvær taskur um herðarnar, og tað hoyrdist á málinum, at hann var arabari. Men hann tók ikki av tilboðnum og helt leiðina fram.

Naomi fekk illgruna til mannin við teimum báðum taskunum, og hon royndi at ringja til løgregluna, men slapp ikki ígjøgnum. Fimm minuttir seinni hoyrdi hon ta fyrru spreingingina og løtu seinni ta seinnu.

### Málið er at drepa

Tær báðar bumburnar brustu tætt við ta gomlu bussstøðina í Tel Aviv. Har eru nógvir smáir handlar og fleiri matstovur. Nógvir útlendingar, sum arbeiða í Tel Aviv, búgva nærhendis bussstøðini, og sambært løgregluni vóru fleiri av teimum særdu útlendingar.

Ísraelsku myndugleikarnir vóru ikki eina løtu í iva um, at tað vóru palestinskir sjálvmorðsbumbumenn, sum høvdu sprongt tær báðar bumburnar, og teir góvu alt fyri eitt palestinsku myndugleikunum skyldina.

-Hesi álopini í Tel Aviv prógva, at palestinsku yvirgangsmenninir hava gjørt av at drepa so nógvar ísraelsmenn, sum teir yvirhøvur kunnu, tí eftir teirra tykki kunnu álopini noyða Ísrael at slaka. Men tað fer ikki at eydnast teimum, segði talsmaðurin hjá Airel Sharon, forsætisráðharra, David Baker, mikukvøldið.

# Avvarandi hjá bumbumonnum fáa eyka samsýning frá Irak

**Eisini avvarandi hjá teimum palestinunum, sum eru deyðir í stríðnum við Ísrael, fáa samsýning frá irakska leiðaranum, Saddam Hussein.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Bretska sjónvarpið Sky News vil vera við, at irakski leiðarin, Saddam Hussein, rindar avvarandi hjá palestinum, sum eru deyðir í bardaganum við ísraelsmenn, endurgjald, og at avvarandi hjá sjálvmorðsbumbumonnum fáa eina eyka samsýning.

Sambært Sky News hevur Irak higartil goldið teimum avvarandi næstan 150 milliónir krónur. Pengarnir eru sendir teimum víðgongdu palestinsku felagsskapunum, sum síðani hava latið teimum avvarandi teir.

Sagt verður, at avvarandi hjá teimum, sum eru deyð í bardaga við ísraelsmenn, fáa 70.000 krónur úr irakska ríkiskassanum, meðan avvarandi hjá sjálvmorðsbumbumonnum fáa góðar 180.000 krónur.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at tíðindi vilja vera við, at Irak hjálpir palestinum, sjálvt um irakska stjórnin hevur víst hesum aftur.

# Háhús eru heilsuskaðilig

**Tey, sum búgva í háhúsum, og tey, sum búgva í grannalgnum, kunnu fáa trupulleikar við andadráttinum, ov høgum blóðtrýsti og sinnistyngd.**

TRIVNAÐUR
*Árni Joensen:*

Hetta er niðurstøðan í einari kanning, sum læknar í Thailandi hava gjørt. Leiðari teirra sigur stutt, at arkitektar, sum tekna háhús, hugsa alt ov lítið um tørvin hjá teimum, sum skulu búgva í húsunum ella teimum, sum búgva í grannalagnum hjá háhúsunum. Heldur hugsa arkitektarnir um sítt egna umdømi, og teir, sum lata húsini byggja, hugsa mest um at fáa sum mest burturúr fyri so lítlar pengar sum gjørligt.

Í sambandi við kanningina hava thailendsku læknarnir tosað við 2.744 fólk í býnum Chiang Mai, sum er har norðuri í Thailandi einar 600 kilometrar frá høvuðsstaðnum Bangkok.

Við samrøðunum sum grundarlagi eru læknarnir komnir til ta niðurstøðu, at fólk, sum búgva í háhúsum ella í grannalagnum hjá háhúsum, eru í størri vanda fyri at fáa lungna- og hjartasjúkur umframt sinnisligar trupulleikar enn fólk, sum búgva í vanligum húsum.

Læknarnir vísa á, at 86 prosent av teimum spurdu kærdu seg um, at háhúsini elva til nógvan larm, vánaliga luft og verri drekkivatn. Tey, sum búgva tætt við háhús, siga, at tey stúra ofta fyri, hvat fer at henda, um eldur kemur í tey høgu húsini, ella um jarðskjálvti verður. Nógv halda seg vita, at tey høgu húsini skerja luftskiftið í grannalagnum, og at luftin tí ofta er tung.

Thailendsku læknarnir eru eisini komnir til ta niðurstøðu, at fólk, sum búgva í háhúsum, hava minni samband við hvør annan enn fólk, sum búgva í vanligum húsum.



# Hin føroyski Per Degn livir enn



**-Um Rasmus Montanus í Føroyum í dag, um kjak og føroyska mentan.**

**"Han har ret og ligger under for massen". Søren Kierkegaard um Erasmus Montanus.**

**Tað er eitt løgið brá við føroyska samleikanum, ið er hetta smásarta lyndið (tað er slíkt , ið føroyskir frøðingar áttu at roynt at arbeitt við at lýst og broytt), ið fær fólk til, og ávísar nýheimvendar akademikarar, at gerast reinir heimstaðarlærarar, ið vilja verja borg og halda á við hálovanini av landi, søgu og fólki, sum um tað nærum var ein trúgv. Ikki minst eru hesir óføra samdir um at verja nakrar sannleikar ímóti atfinningarsomum røddum, men kanska er tað prísurin ein má gjalda fyri at sleppa inn á vegin til teir røttu sirklarnar millum føroysku mentanarelituna í dag?**

HUGLEIÐING
*Kim Simonsen*

Taka vit um støðuna í dag við gamla Ludvig Holberg í mentu, so meini eg, at mong ikki hava skilt, hvat Holberg vildi við persóninum. Fólk brúka mangan at gera lesandi ella intellektuell til gjøldurs við hesum persóni, men gera samstundis seg sjálvan til gjøldurs, tí tey hava púra misskilt tragiska partin av søguni um bóndastudentin Erasmus Montanus. Erasmus umboðar, umframt at hann er arrogantur, eisini vitan, upplýsing og modernaða vísund, meðan bygdarfólkið við Per Degn á odda umboða óvitan og dogmatismu, ið m.a. fær tey at halda, at jørðin er fløt.

Sjálvandi er tað okkurt um tað, at betur er bøtandi hond enn spillandi tunga, og at tað ikki altíð loysir seg hjá lesandi og hugsandi fólki at sorla alt fyri síni slóð, men hvar er markið ímillum reina tøgnmentan og atfinningarsemi?

Vit kenna í bókmentunum, ungar spelknar heimvendar útisetar, so sum Andreas Heyde úr skaldsøguni Barbara, ið onkur meinar bygdi á Svabo, men kanska veruligani meiri var Nicolai Mohr. Bæði Mohr og Svabo búðu á Regensen, men peningurin var ikki nógvur, so teir noyddust at gevast við at lesa. Eg haldi t.d. , at hvørki Svabo ella Nicolai Mohr vóru Erasmusi Montanus líkir, í tí negativu merkingini, meir virkaði Svabo í djúpari armóð fyri at fáa Føroya frágreiðingina útgivna, ið tó ongantíð útkom, meðan hann livdi. Sum eg síggi Svabo, so var hann positiva ímyndin av einum føroyskum lesandi, ið møtti stórari mótgongd í Føroyum, m.a. frá løgmanninum Johan Hendrik Weyhe, ið ikki helt um hugskotini hjá Svabo, m.a. fyri at betra um føroyska jarðarbrúkið. Svabo virkaði í somu ond sum Holberg sjálvur, ið fekst við nógv ymisk fag, og royndi seg sum alfrøðingur (polyhistor).

### Jørðin er ikki fløt

*"...jeg og min Hustru ere begge skikkelige og gudfrygtige Folk, som heller vrider Halsen om paa vor Datter, end giver hende til En, der siger at Jorden er rund og fører falsk Lærdom her ind i Byen"*

Jesper Ridefoged frá leikinum Erasmus Montanus, ið ber boð frá foreldrunum hjá unnustini hjá Erasmusi.

*"...Erasmus var de nye Tankers Martyr for Omgivelsernes Stupiditet"*

*Carl Roos, 1922*

Erasmus noyðist at enda játta, at jørðin er fløt, og biða um fyrigeving fyri at hann hevur rætt. Her liggur tað tragiska, at hann á henda hátt er ein pínsluváttur fyri nýggju vitanina og at enda eitt offur fyri fjøldini. Hetta kenna vit dømi um í Føroyum, at nýggj hugrensl doyggja, og fólk tødna, sum m.a. Karsten Hoydal helt fyri, at tað var mangur maður frægari enn hann, sum var tødnaður í Føroyum. Hevði Holberg liva í dag, so hevði hann funnist at bæði hesum og hasum, m.a. at akademikarar vilja berjast fyri at verja status quo, fyri ein og hvønn prís, sjálvt um sjálvt hjartað í einum og hvørjum samfelag er ein opin kjakmentan.

### Holberg og feudala einaræði

*"Søguligani sæð var Holberg reaktionerur, og tey søguligu reaktioneru drøg i skaldskapinum gjørdust týðuligari sum árini gingu, og nýggja handilskapitalisman gjørdist sterkari, og á henda hátt kom at hótta hansara virkna embætisborgarliga heim."*

*Johan Fjord Jensen, danskur bókmentafrøðingur.*

Kendi danski rithøvundin Ebbe Kløvedal Reich segði herfyri í nýggjari bók um norska høvundan Ludvig Holberg (1684-1754), at hann var ein einsamallur maður í samtíðini, ein veldigur rationalistiskur alfrøðingur, ella polyhistor, sum tað eisini eitur, ið skrivaði um alt frá fíggjarfrøði til løgfrøði og heimspeki. Holberg var ein ótrúligani áhugaverdur akademikari og høvundi, ið í dag mest er kendur fyri at skriva kendar sjónleikir sum Jeppe på bjerget, Erasmus Montanus og skaldsøgur sum Niels Klim. Men Ebbe Kløvedal Reich gloymdi ongantíð at siga, at Holberg, um vit skulu leiða hann fram til dagin í dag, var bæði mentanarkonservativur og hevði sera afturhaldssinnaði virði sum heild. Holberg trúði m.a. gløðandi uppá upplýsta einaveldi í Danmark. Sjálvur var hann múgvandi maður í Danmark, og fekk at enda barón titul fyri at tæna reaktionera feudala kongavaldinum. Við hesum í mentu er tað áhugavert at hugsa sær til, hvussu vit í dag royna at brúka, manga eina skeiva tulking, av einum bókmentaligum persóni úr 18 aldar donskum/norskum sjónleiksskaldskapi.

### Heimføðisskapur

*"Vor Bogverdens dybeste Kunstværk (...) Det dybeste af alle Holbergs Skuespil og det hvori han er aller originalest"*

*Georg Brandes um leikin Erasmus Montanus.*

Mangan havi eg hug at siga, tá eg hoyri kórið av sjálvsgratulerandi føroyingum, og tigandi akademikarum, at teir fáa meg at hugsa um persónin Per Degn úr leikinum Erasmus Montanus, ið er hesin hálvlistni deknur, ið bert klárar at imponera bygdarfólkið, sum í leikinum ikki eru av gløggastu fólkum. Per Degn torir ikki at líta út um bøgarðarnar, mest tí hann er bangin, ræðist og ikki dámar fólk sum Erasmus Montanus, ið hóast alt er lisin og m.a. dugir latín. Tað, sum Holberg vildi siga við Rasmus Berg ella Erasmus Montanus, var umframt at hann hevði sínar lótir, eisini umboðaði upplýsing og vitan. Holberg vildi ikki siga, at Per Degn og tey í heimbygdini høvdu rætt. Erasmus var ein droymari og ein uppreistrarmaður, men tað er bert hann í heimbygdini, ið m.a. veit, at heimurin er ikki ein flata, men er rundur. Tað er hetta, sum fær eksistentialistiska danska heimspekingin Søren Kierkegaard til at siga, at tað er Erasmus, ið hevur rætt, og at hann kúgaður av fjøldini. Tí er tað kanska hugstoytt, at mangir ungir akademikarar enda við at velja at vera partur av hesi fjøld, ið vil troyta gamlar ósannleikar.

Ein annar intellektuellur høvundi, Henrik Stangerup, gjørdi ein film um Erasmus, har Erasmus var ein ungdómsuppreistrarmaður, ein stríðsmaður í móti óvitan í Suður Amerika. Øll rørslan, ið vit í dag kalla ungdómsuppreisturin, ella 68´arnir sóu Erasmus sum eitt tragiskt offur fyri einari reaktionerari tíð, og harafturat Holberg sum bæði ein gløggan høvund, men eisini ein, ið vildi skerja ræsurnar hjá tí einstaka við sínum æviga: "flúgv ikki hægri enn veingirnar kunnu bera" morali, ella moralismu. Neyðugt er eisini, at vit ikki gloyma, at Holberg livdi í eini tíð, tá ein kundi verða vístur av landinum ella hálvshøgdur, um ein segði tað minsta, ið ikki hóvaði kongavaldinum.. Hetta gjørdi sjálvandi, at Holberg var avmarkaður í sínum evnisvali.

Spæla vit við tankanum um, at franski sosiolugurin Pierre Boudieu hevði verið ein føroyskur lesandi í dag, ella ein intellektuell rødd, ið skrivaði, sjálvandi atfinningarsamt sum var hansara aðalmerki, um m.a. Føroyar, ja so høvdu sjálvgratulerandi tjóðarbyggjarar roynt at skotið eftir honum, tí hann ikki er nóg føroyskur, ein "Erasmus Montanus", kanska. Okkurt er galið her, ein skitzofren bólkamentan og ótti fyri at standa fram sjálvi uttan bólkin við øðrum enn tí lætta og sjálvsagda og tí skeiva.

Palestinentiski bókmentafrøðingurin Edward Said, professari á Columbia University i New York, sigur, at hin intellektuelli má tora at berjast fyri at skapa eitt mál, ið tosar valdinum ímóti og má tora at loypa út í tjak um t.d. innilokaða nationalismu, og at nøkur fáa vald at áseta sannleikan í einum samfelag. Tað tykist vera tað øvugta, ið mong vilja verja í Føroyum í dag.

### Smásart lyndi

*"Jeg veed Ingen som skriger stærkere end Æsle og Landsbydegne"*

*Erasmus Montanus til Per Degn*

Tað er júst hetta deknalyndi, ið eg síggi runt Føroya land, har man blakar mykju eftir einum og hvørjum, ið hugsar sjálvur og setur spurningar við status quo í føroyska samfelagnum í dag. Tað var júst hetta, ið leikstjórin og sjónleikarin Eyðun Johannesen helt fyri í eini sjónvarpssamrøðu í 90inum, har hann tók harligani til orðana móti tí hann kallaði "deknakendum skúlalærarum" har hann sipaði til hetta prædikandi og moraliserandi, og henda formyndaratóna sum hann sá allarstaðir í føroysku mentanini.

Tað tikist mangan vera hesin sami evindaligi føroyski deknalesturin, ið mong vilja verja ímóti øllum føroyskum akademikarum, og lesandi, serligani teim, ið finnast at. Men hví er tað so, er tað óttin fyri at missa einkarrættin at boða vitan?

Betur var um skrivandi fólk royndu at kanalisera orkuna inná aðrar ræsur, og millum annað viðgjørt, tulkaðu og perspektiveraðu føroysku mentanina í dag, sambart altjóða rák, so sum t.d. eksistentialisma, einstaklingalyndi, modernitet, altjóðagerðing, heldur enn at brúka orkuna uppá at fáa onnur at tiga, við t.d. at blaka skeivar tulkingar av einum persóni úr einum 1700 tals sjónleiki. Ikki minst tí at føroyska mentanin kann í dag bjóða alt frá eldri til nýggjari lívsformar, og ikki minst eru Føroyar mitt í eini spennandi broytingartíð, har nýggj mentan og vitan tykist spretta – sjálvandi skapar hetta kjak, stríð men eisini ótrúligar møguleikar.